# Eg trívist best á

**- Eg leiti altíð eftir nýggjum avbjóðingum, sum við fyrsta eygnabrá kunnu tykjast fullkomiliga ómøguligar at loysa. Eg elski heilt einfalt at vera í støðum við nógvum ókendum faktorum, har eg ikki sjálvur havi fult tamarhald á tí, sum fer fram. Orðini eigur 39 ára gamli klaksvíkingurin Jan Ziskasen, ið fyrst las gudfrøði, men endaði sum KT-stjóri hjá risastóru og heimsumfevnandi fyritøkuni Kraft Foods. Nú eru boð eftir honum frá høvuðsborgini í Chicago**



## Yrkisleið

**Stefan í Skorini**
stefan_skorini@hotmail.com

**Sosialurin, London:** Heimurin er hansara arbeiðspláss. Hann er partur av einum toymi, ið hevur ábyrgdina av øllum telduskipanum hjá fyritøkuni Kraft Foods kring allan knøttin. Tey umleið 300 starvsfólkini, ið arbeiða undir hansara leiðslu, eru ættað úr eini tríati ymsum londum, og tað er hansara uppgáva at syrgja fyri, at tey virka sum ein samansjóðað eind. Komandi KT-verkætlanin, sum hann skal hava høvuðsábyrgdina av, er mett at kosta góðar 5 milliardir krónur komandi 4-5 árini.

Hóast Jan Ziskasen er ein altjóðagjørdur norðoyingur mitt í brúsandi metropolinum við einum starvi, ið krevur óvanligt hegni og dugnasemi, hevur hann enn bæði beinini væl og virðiliga á fastari grund – her er einki stórlæti yvir manninum, hóast hann júst er framfluttur til høvuðsskrivstovuna hjá Kraft Foods í Chicago.

Vit hava hitt fryntliga og braneggjaða klaksvíkingin á skrivstovu hansara í Chiswick í vestara parti av London. Futuristisku skrivstovubygningarnir, har fyritøkan húsast, minna mest um ein leikpall úr einum framtíðar science fiction filmi, men skrivstovan hjá Jan er tó rættiliga spartanskt innrættað, og tað verður ikki oyðslað við óneyðugum marglæti, hóast ráð óivað eru til tess.

### Leiðari í altjóða umhvørvi

Jan Ziskasen er til dagligt leiðari hjá fleiri ymsum liðum av fólki kring heimin. Umframt tey hundrað starvsfólkini í London, hevur hann ábyrgdina fyri liðum ymsastaðni í Evropa, Bangalore og Hyderabad í India, eins væl og New York og Chicago í USA.

- Her á skrivstovuni í London eru umleið tríati ymsar tjóðir umboðaðar. Vit hava fólk við ymsum húðaliti, ymsum átrúnaði og javnt býti millum menn og kvinnur. Umframt vanligar vesturlendingar hava vit eisini kvinnur við sløri og menn við turban. Eitt slíkt altjóða umhvørvi fært tú so at siga bara í London, og tað er ein stór styrki hjá okkum sum fyritøka, at vit hava eina so fjølbroytta samanseting av menniskjum, sigur Jan Ziskasen.

Hóast nógvar ymsar mentanir arbeiða saman á skrivstovuni, eru als eingir samanstoytir millum starvsfólkið, og tann lærdómin hevur Jan tikið til sín.

- Eg havi lært at virka í einum fjølbroyttum umhvørvi, har nógvar ymsar mentanir hvønn dag koma saman uttan nakrar trupulleikar yvirhøvur. Vit hava tørv á fjølbroytni á arbeiðsplássinum, og tað virðismeta vit sera høgt, sigur Jan um ta fjølbroyttu samansetingina av fólki bæði í London og á arbeiðsplássinum.

- Tá eg skal meta um eitt starvsfólk, fáa øll somu viðferð. Eg síggi bert tess eginleikar uttan mun til, hvørji óviðkomandi ytri

Sosialurin